# Føroyskur fiskur til itálska mark

**Óneyðugt er at gita, hvør høvuðsmarknaðurin hjá fiskavirkinum FarIta í Haldórsvík er. – Vit hava samband við fleiri smærri keyparar í Italia, sum keypa okkara dygdarvørur, sigur virkisleiðarin, Háldan Haldansen**

FISKAVIRKI

*Orð & myndir: Snorri Brend*



*Tá nýggju eigararnir yvirtóku bygningin varð arbeiðsgongdin broytt alt fyri eitt, soleiðis at meiri "flow" kom í arbeiðsgongdina*

**Haldórsvík:** Tað kennist so hugaligt at koma inn í henda virkisbygningin á havnalagnum.

Tað er týsdagur og tað er kuldi í luftini. Men inni á virkinum er ikki líkt til at arbeiðsfólkið hevur trupulleikar við at halda hitanum.

Ljóðið frá maskinum, ið koyra er tað fyrsta, ið møtir okkum tá vit trína innar í virkið.

Virkisleiðarin, Háldan Haldansen úr Vestmanna tekur ímóti okkum og vísir okkum framleiðsluhøllina, har arbeiðsfólkið tá arbeiddi saltfisk.

Arbeiðsgongdin er væl skipað: Ráfiskurin kemur inn í sunnara endanum av virkinum, og hann sæst ikki aftur, fyrrenn hann er klárur til avskipingar til itálska marknaðin í norðara enda.

Henda morgunin vit vitjaðu virkið vóru tey eini 25 til arbeiðis. Kvinnur og menn, sum fáa sína dagligu úrtøku í hesum virkinum á havnalagnum í Haldórsvík.

## Maskinurnar hvurvu

Tá fólk tosa um flakavirkið í Vík so koma helst myndirnar fram aftur í minninum, - hesar myndir, sum vóru í fjølmiðlunum fyri góðum 10 árum síðani.

Virkið var afturlatið, koyrt í tann sonevnda mølposan, og menn stríddust við at taka alt tað út úr virkinum, sum kundi brúkast á øðrum virkjum kring landið - maskinur, útgerð, ja sjálvt lampurnar.

Bygdarfólkinum dámdi sum sum vera man hetta sera illa, tí nú var vandi fyri at virksemi ikki fór at verða á virkinum aftur í bræði:

Vóru fyrst maskinurnar farnar úr virkinum og av bygdini, so mundi verða seinur dagur til tær fóru at koma aftur!

Men lukkutíð fyri víkafólk, so vóru tað aftur menn, sum dugdu at síggja vinnuligar møguleikar í



*Saltfiskurin er væl dámdur í Italia, og tað er eisini hagar at meginparturin av framleiðsluni hjá FarIta fer*

